# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit skulu hava nøkur stig afturat, og tí kunnu vit ikki verða vísur í at vinna FM, fyrr enn vit hava fingið tey stigini.*

*Jens Martin Knudsen, NSÍ-málmaður*

# 60 spælarar í altjóða eldin

**Allar avbjóðingarnar tykjast stórar, men størsti bitin verður Frakland á heimavølli, tá ið trý landslið næstu dagarnar skulu verja føroysku æruna í europeiskum kappingum**



*Føroyska a-landsliðið í fótbólti spælir leygardagin stórdyst á heimavølli ímóti Fraklandi. Eftir tað bíða strævnar uppgávur ímóti Italia og Ukraina á útivølli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**ALTJÓÐA FÓTBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tvey umfør eru eftir at heimligu landskappingini. Tey verða avgreidd tvey tey seinastu vikuskiftini í oktober. Næstu dagarnar eru altjóða uppgávur á fótbóltsskránni. Størsta avbjóðingin verður tað, tá ið fronsku stjørnurnar leygardagin fara at spæla á Tórsvølli.

FIFA styrkislistin boðar ikki frá, at Føroyar eru nakað serligt í altjóða høpi. Men tølini siga, at føroyingar eru dúgligir luttakarar í europeisku kappingunum.

Tað eru seytjan ár síðani, at a-landsliðið fyrstu ferð luttók í undankapping. Síðani tá hevur gingið skjótt. Bæði í landsliðshøpi og í felagshøpi er talan vorðin um rættuliga stórt europeiskt virksemi. Í ár hava Føroyar spælt við a-liði, U21, U19, U17 og U15 á mannfólkasíðuni, og á kvinnusíðuni hava Føroyar verið í europeiska eldinum við U19 og U17, og kvinnulandsliðið skal seinni fyrstu vikuna í november luttaka í EM undankapping í Litava. Mótstøðuliðini vera tey trý baltisku londini – Estland, Letland og Litava.

Í hesi vikuni eru trý landslið við tilsaman umleið 60 spælarum í europeiska eldinum. Umframt spælararnar eru umleið tjúgu fólk beinleiðis upptikin av landsliðunum. Tað vil við øðrum orðum siga, at í hesi vikuni brúka umleið 80 føroyingar sína tíð upp á landsliðsfótbólt. Tá eru tey ikki tald uppí, sum hava uppgávur í sambandi við heimadystirnar, eitt nú sum vaktarfólk og sølufólk.

Landsliðsfótbólturin ber eisini so nógv annað virksemi við sær: gistingarhús, flutningsfyritøkur og eisini fjølmiðlarnir brúka starvsfólk og arbeiðstímar upp á landsliðsfótbóltin.

### Avbjóðingarnar

Í morgun lætti U19 landsliðið úr Vágum. Teir eru á veg til Bulgaria, har mótstøðan í EM undankappingini verður ivaleysa stór. Mikudagin skulu Føroyar spæla ímóti Turkalandi, fríggjadagin verður Danmark mótstøðuliðið, og mánadagin um eina viku skulu Føroyar spæla ímóti Bulgaria.

Umframt átjan spælarar eru fimm venjarar, ferðaleiðarar, liðleiðarar og fysioterapeutar í tí ferðalagnum.

A-landsliðið er stevnt saman mikudagin. Tá verður farið undir fyrireikingar til undankappingardystirnar á heimavølli leygardagin ímóti Fraklandi og mikudagin í næstu viku á útivølli í Ukreina. 20 spælarar hittast mikudagin í høvuðsstaðnum, og afturat teimum kemur Atli Danielsen við í ferðalagið til Ukreina. Hann er leikbannaður leygardagin.

Umframt spælararnar eru ellivu persónar knýttir at a-landsliðnum sum leiðarar, venjarar og hjálparar av ymsum slagi.

U21 landsliðið er stevnt saman í Klaksvík mikudagin. Avbjóðingarnar hjá hesum liðnum eru Aserbajan á Svangaskarði fyrrapartin leygardagin og Kroatia á Tórsvølli seinnapartin mikudagin í næstu viku. Umframt nítjan spælarar eru fimm fólk knýtt at hesum liðnum.

Seinni í mánaðinum fer U17 landsliðið til Týsklands at taka lut í EM undankappingarbólki.

# Allan skal fáa AB upp aftur

**- Eg havi altíð havt hug at gerast venjari, og ongantíð betur, at tað nú skuldi gerast í einum felagi, ið er so positivt, sigur Allan Mørkøre, nýggjur venjari hjá AB**

**FÓTBÓLTUR**

*Niels Petersen*

Tað er nú greitt, at 35 ára gamli Allan Mørkøre, sum vit øll kenna frá hansara tíð á landsliðnum og annars frá toppfótbólti í Føroyum gjøgnum mong ár, skal vera venjari hjá AB komandi kappingarár.

Allan hevur spælt á hægsta støði í føroyskum fótbólti í nógv ár, og eisini hevur hann roynt seg sum yrkisleikari í íslendska IBV. Gjøgnum hesi mongu ár hevur hann eisini fingið eina rúgvu av royndum, og tað koma teir av Argjum at fáa góðan av, eftir hetta kappingarár.

Á heimasíðuni hjá AB stendur at lesa at tað er ein lítil dreymur, sum nú er vorðin veruleiki, hjá Allani.

- Eg havi altíð havt hug at gerast venjari, og ongantíð betur, at tað nú skuldi gerast í einum felagi, ið er so positivt, leggur hann afturat.

Allan Mørkøre, saman við øðrum góðum monnum, mugu flest øll kenna aftur frá landsliðnum sum vann hin tiltikna sigurin í 1990 móti Eysturríki, við stórskjúttanum Toni Polster á odda. Tað eru 17 ár liðin síðan hetta bragd var framt, og Allan spælur enn á hægsta stigi í føroyskum fótbólti. Hetta sigur ikki heilt so lítið um klaksvíkingin, sum nú skal royna at lyfta AB upp aftur í bestu deildina.

Eg ætli mær at gera mítt besta til at náa málinum, sum er at fáa AB upp aftur.

Eftir so mong ár í fótbólti er eyðsæð, at vitanin, Allan hevur um ymisk viðurskifti innan fótbóltsheimin, er almikil. Hetta hava teir sæð á Argjum og tessvegna bjóða honum starvið sum venjari hjá felagnum á Hamrinum.

Allan hevur onga venjaraútbúgving, men sigur seg fara at byrja at taka tað sum krevst, tá FSF skipar fyri hesum í januar.

